# Outlander og CX-7 í Kringvarpinum



Rannvá í Stórustovu er ein av bilaummælarunum. Fróði Løksagarð er vertur í sendingini



*Mazda CX-7 er ein sonevndur Crossover - ein kombinatión av fleiri ymiskum biltypum*




*Mitsubishi Outlander er ein SUV (Sport Utility Vehicle) við 7 sitiplássum*

**Í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum hesa vikuna vórðu tveir bilar ummældir: Mazda CX-7 og Mitsubishi Outlander, annar ein sonevndur Crossover og hin ein SUV**

BILAR

Fyrri bilurin, sum varð royndarkoyrdur í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum mikudagin 24. oktober var ein Mazda CX-7 við 2,3-litra bensinmotori við 260 hk.

Mazda CX-7 er ein sonevndur Crossover - ein kombinatión av fleiri ymiskum biltypum við bæði sportsligum og SUV (Sport Utility Vehicle) eginleikum. Bilurin verður drivin av øllum fýra hjólunum.

Leðurkabinan er bæði snøgg og sportslig við góðum plássi til fimm vaksin og teirra viðføri. Innrættingin er liðilig og koyrieginleikarnir eru bæði góðir og stabilir við eitt nú 18" hjólum. Bilurin sum var royndarkoyrdur kostaði kr. 498.000. Hann hevur t.d. BOSE-ljóðanlegg, xenon forlyktir og elstilling av førarasetrinum.

Mazda CX-7 kann síggjast og roynast hjá Bilasøluni í Hoyvík. Prísirnir byrja við kr. 448.000.

## Mitsubishi Outlander

Seinni bilurin varð ein Mitsubishi Outlander, ein sonevndur SUV (Sport Utility Vehicle). Talan er um ein arbeiðsligan bil við liðiligari og praktiskari innrætting, t.d. er baklúkan tvídeild, soleiðis at lessihæddin er sera lág (60 cm). Við einum knøtti í viðførisrúminum kunnu baksetrini ómakasleyst leggjast elektroniskt niður.

2.0 DI-D dieselotorurin við 140 hk passar við sínum snúningsmomenti upp á 310 Nm, væl til bilin, soleiðis at hann er kvikur, orkar væl og hevur yvirskot av kraft.

Hóast Outlander er ein 4x4, ber til við einum knøtti at stilla um til at drívmegin einans er á forhjólunum. Bilurin fæst bæði við 5 og 7 sitiplássum.

Mitsubishi Outlander fæst í tveimum 2.0 DI-D útgávunum: Intense og Instyle (við 7 setrum), sum kosta ávikavist 350.000 og 399.000 krónur. Annars er ein útgáva við 2,4 litra bensinmotori við 170 hk komin á marknaðin, sum í Invite útgávuni kemur at kosta umleið 320.000 krónur. Bilurin kann síggjast og roynast hjá Ivan Johansen Bilum við Hoyvíksvegin.

Fróði Løksagarð stóð fyri sendingini, og bilaummælararar vóru Óla Jákup Rólantsson frá Vikublaðnum, Rannvá í Stórustovu, bilentusiast, og Magnus Gunnarsson frá Sosialinum.

mg

# Fyrstu myndirnar av nýggja C5

**Citroën almannakunngerða nú fyrstu myndirnar av nýggja Citroën C5, sum kemur á marknaðin í 2008**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Citroën C5 verður ein nútímans bilur við flottum designi*



*Citroën C5*



*Citroën C5 stationcar*

Komandi ár kemur ein heilt nýggjur Citroën C5 á marknaðin. Nýggi C5, sum verður nakað størri enn tann núverandi, verður at fáa við tveimum ymiskum fjaðraskipanum, sum kundin kann velja ímillum. Talan verður um hydraulisku skipanina »Hydractive 3 Plus« og ein vanligan undirvogn við stálfjaðrum. Báðar útgávurnar hava multilink hjólupphang framman og aftan av sama slagi sum tann størri Citroën C6.

Tríggir benzin- og fýra dieselmotorar vera at velja ímillum. Minsti bensinmotorurin verðu ein 1,8 við 127 hk. Toppmodellini fáa V6-motorar við ávikavist 218 (bensin) og 208 hk (diesel). Stórur dentur verður lagdur á kvalitet og ljóðdoyving, eins og trygdini við t.d. upp til níggju airbag.

Citroën C5 verður gjørdur sum sedan og stationcar.